# Í lagi við kommersiellari kvinnustevnu – men sigið frá í góðari tíð

RÓSELY REYNSTIND

Nú eitt kjak hevur tikið seg upp um stóra tiltakið sum Kvinna og Demokratia (nú bara Kvinna) standa fyri, vil eg eisini nýta høvi til at koma við mínari hugsan.

Kvinna lýsir við tiltakinum í seinasta blað teirra, sum eitt tiltak fyri nýmótans javnstøðu og at øll í hava áhuga eru vælkomin við. Hetta er heilt í tráð við, hvat Altjóða Kvinnudagurin handlar um, at hann er fyri øll og við nýhugsan. Altjóða Kvinnudagurin var av uppruna til fyri m.a. at fáa valrætt til kvinnur, og tað vóru sosialistiskar arbeiðskvinnur, ið stríddust. Vit hava í dag valrætt, men kunnu øll vera samd um, at vit her í Føroyum ikki eru væl umboðaðar á Løgtingi, Landsstýri og í almennum nevndum. Tað einasta í stóra tiltakinum hjá Kvinnu, ið ikki er í tráð við, hvat altjóða Kvinnudagurin eigur at umboða er, at allar kvinnur uttan mun til, hvussu kvinnan er fyri peningaliga kunnu vera við. Tá prísurin er so høgur, sum hann er, er hetta ikki eitt tiltak fyri allar kvinnur, og er hesin prísurin als ikki í tráð við hugsanina um Altjóða Kvinnudagin, og tað er prísurin á tiltakinum og tað at tiltakið er á Altjóða Kvinnudegnum, sum stoytir meg.

Eg haldi, at tiltakið er eitt sera gott kommersielt tiltak og hevði havt stóra virðing fyri Kvinnu, um hettar var lýst sum tað, tað er, eitt gott kommersielt tiltak fyri kvinnur, ið hava ráð og áhuga í slíkum evnum. At hava slíkt tiltak á Altjóða Kvinnudegnum er heldur ikki rætt eftir mínari meining, tí hesin dagur er fyri allar kvinnur, og eigur at vera brúktur til at varpa ljós á støðuna hjá øllum kvinnum í samfelagnum. Tí haldi eg, at eitt slíkt tiltak skuldi verið allar aðrar dagar enn hendan dagin.

Tað er ein erlig sak, at Kvinna stílar fyri einum stórum kommersiellum tiltaki av slíkum slag, men lat vera við at pástanda, at hetta er fyri øll, ið hava áhuga, tí tað er beinleiðis provokerandi at siga slíkt við meg og síðan seta ein prís, sum eg ikki eri før fyri at gjalda og fleiri við mær. Tá tú Lena Mohr so stendur í SVF og sigur, at um eg bert leggi 36 kr. til síðis um dagin, so kann eg vera við, so veit tú ikki, hvat tú tosar um, og tað er ørkymlandi at hugsa sær, at kanska fleiri kvinnur í Føroyum ikki eru vitandi um, at vit eru til. Vit sum ikki hava ráð til eitt slíkt tiltak, eru alla staðni í Føroyum og ikki bara flakakvinnur og almennir klientar, men eisini millumleiðarar, skrivstovukvinnur v. m. Og tað er als ikki bara grenj, eg havi kr. 1.000 um vikuna til mat vm. til mín og 3 børn, havi eitt gott starv, egin hús, egnan bil og havi sum so onki at klaga um, men hjá mær er ongin møguleiki fyri at taka kr. 1.000 úr mínum húsarhaldspengum. Annars eri eg áhugað í øllum samfelagsviðurskiftum, og var tað soleiðis, at tiltakið var lýst í góðari tíð og var ein leygardag, so hevði eg verið ein av teimum, sum hevði gjørt alt fyri at sett pening til síðis fyri at sloppið við, tí tiltakið er gott og spennandi.

Leikluturin hjá Demokratia í hesum sambandi er eftir mínum tykki ein heilt annar. So sum eg havi skilt tað er nevndin í Demokratia sett fyri at økja leiklutin hjá kvinnum í politikki, og hava tær fingið almennan pening at umsita til hettar endamálið. Demokratia eigur ikki at stuðla einum kommersiellum tiltaki sum hesum við almennum pengum, sjálvt um tað er "bert kr. 45.000", og er tað ongin umbering, at politikarir annars blaka hundratals túsund av peningi til alt møguligt annað, tað er bara hesin peningurin, sum tað snýr seg um í hesum sambandi, og koma vit ongan veg við at blaka eftir øðrum. Vit áttu heldur at tala at, tá vit hoyra/síggja at almennur peningur verður blakaður vekk.

Lesið síðan á portalinum at:

Javnaðarflokkurin harmast um tað niðrandi viðferð, ið arbeiðið at menna kvinnuluttøkuna í politikki hevur fingið í løgtinginum í seinastuni. Sum javnaðarfólk eru vit sannførd um, at eitt javnt valdsbýti ímillum kvinnur og menn er ein av fortreytunum fyri einum betri samfelag.

Ja, so hugsi eg, nú er ongin sosialisma eftir í Javnaðarflokkinum, tað vóru arbeiðskvinnur úr tí sosialistiska umhvørvinum í Týsklandi og Danmark sum byrjaðu Kvinnudagin, og nú stuðlar tann flokkurin, sum skal eitast fyri at verða ein sosialistiskur (arbeiðara)flokkur, einum kommersiellum tiltakið sum er Altjóða Kvinnudagin, og har munur verður gjørdur á kvinnum, hugsi her um, at bert kvinnur, ið hava ráð at gjalda kunnu fara við, vit sum hava áhuga, men ikki ráð sleppa ikki við. Hevði ikki hugsað nærri um tað, um tað var Fólkaflokkurin sum gjørdi slíkt, men Javnaðarflokkurin, hvar er nú javnin blivin av.

Er hettar nýmótans javnstøða, at vit nú skulu til at kempa fyri at fáa javnstøðu millum kvinnur, sum eru væl fyri peningaliga og kvinnur í eru minni væl fyri. Tað kann ikki vera rætt. Vit hava langt eftir á mál fyri at fáa javnstøðu og hava als ikki brúk fyri at skapa ójavnstøðu í millum okkum kvinnur.

Við hesum er ikki javnt valdsbýti ímillum kvinnur og menn, tí valdsbýti verður nú ímillum peningaligasterkar kvinnur og menn.

So nú mugu vit, sum ikki lúka treytirnar fyri, at vera við í slíkum tiltøkum, finna aðrar vegir, og hava vit veruliga brúk fyri at varpa ljós á kvinnur í Føroyum. Tað eru nógv góð evnir, ið kundu verið tikin upp hendan Altjóða Kvinnudagin, sum vit kundu fingið minst líka nógv burtúr og sum er í tráð við endamálið við hesum degi. Vit kundu funnið kvinnur í Føroyum úr øllum samfelagsløgum, sum á ein ella annan hátt hava klárað seg væl. Hvat hava tær gjørt? Hvussu hava gjørt tað? og Hví?

So mín niðurstøða er púra greið:

Kvinna, gerið endeliga slíkar kommersiellar ráðstevnur, men boða frá í góðari tíð, so eg eisini kann verða við.

Lena L. Mohr, tað hevði verið gott, um tú setti teg betur inn í viðurskiftini hjá kvinnum í Føroyum, tí vit eru nakrar, sum veruliga ikki kunnu seta kr. 36 til síðis um dagin.

Demokratia: Tit eiga ikki at seta almennan pening í eitt kommersielt tiltak, har allar kvinnur í Føroyum ikki hava ráð at verða við.

Altjóða Kvinnudagurin, eigur at verða brúktur til at varpa ljós á støðuna hjá kvinnum í Føroyum og í øðrum londum. Hevði verið áhugavert, um vit longu nú funnu eitt evni, sum vit kundu tikið upp á Altjóða Kvinnudegnum næsta ár.

Við vón um, at vit øll fáa ein góðan Altjóða Kvinnudag!

# Íslandssáttmálin – ein búskaparlig vanlukka

ATLI HANSEN



Gøtu 18. februar 2007

Lítið hevur verið at hoyrt um sínámillum fiskivinnusamráðingarnar millum Føroyar og Ísland, men seinasta fríggjakvøld komu so boðini í Sjónvarpinum, at sáttmáli var undirskrivaður og fiskimálaráðharrin og formaðurin í Føroya Reiðarafelag fingust at siga, at teir vóru væl nøgdir. Og so átti tjóðin eisini at verið væl nøgd. Men tað hevur hon neyvan nakra grund til tað. Tíðindaskriv á heimasíðuni hjá Fiskimálaráðnum váttar, hvussu lítið er komið burtur-úr.

Ongantíð hava Føroya verið so væl fyri at seta krøv við nakrar samráðingar. Vit høvdu nógvar og stórar trumfir, men eingin er spældur út. Man roynir at blása okkurt upp um frambrot við lodnuni. Hetta er neyvan so og hevur lítið og einki upp á seg og átti undir øllum umstøðum et verið ein sjálvfylgja. Íslendingar hava diskrimínerað okkum við ikki at geva okkara skipum somu rættindir sum síni egnu til at veiða og viðgera lodnu. Tað manglaði bara, at vit ikki skuldu fáa hesi rættindini, sum vit enn bert hava fingið ein lítlan part av.

Tað er langt eftir á mál, áðrenn hetta er komið í pottin. Tey stóru virðini í sáttmálanum verða illa nokk tikin upp á tunguna nevniliga: atgongdina til at veiða svartkjaft og sild í okkara øki. Jú, teir hava avmarkað talið av skipum í senn til at vera ikki meira enn 12. Herí er eingin avmarking. Neyvan nakrantíð hava 12 íslendsk svartkjaftaskip verið á føroyskum øki í senn.

Í øllum sínámillum fiskivinnusamráðingum verður í dag míðjað ímóti at fáa "balanseraðar sáttmálar" – t. v. s. sáttmálar, sum hava nøkulunda sama virði fyri báðar partar. Hetta verður gjørt upp sum eitt toskavirði, har øll fiskasløg verða umroknað til toskavirðir (toskaequivalentar). T.d. er 1 t av hýsu = 1 t av toski, 1 t av longu = 0,9 t av toski, 1 t av upsa = 0,77 t av toski, 1 t av sild = 0,8 t av toski, 1 t av makreli = 0,3 t av toski, 1 t av svartkjafti = 0,125 t av toski og 1 t av lodnu = 0,1 t av toski. Hetta eru um mann so má siga gjadoyrakursinir tá íð samrátt verður.

Íslendingar eru hvørki verri ella betri enn aðrar tjóðir at samráðast við, men í okkara eyðmýgd undir hesum samráðingunum hava vit sjálvi komið okkum í eina støðu, har tað snøgt sagt ikki ber til at seta krøv tí vit innanhýsis hava mótsett áhugamál. Hvørja ferð okkurt verður borið upp á mál hoyra vit røddir – bæði frá okkara egnu og íslendingum - at vit hava eina botnfiskakvotu, sum vit einki hava givið fyri og hetta leggur gift fyri eina hvørja roynd at koma víðari.

Vit kunnu ikki liva við at verða settir skák og mát hvørt ár av hesi botnfiskakvotuni og tí mugu vit taka hetta upp við íslendingar, áðrenn vit fara at samráðast aftur. Vit mugu loysa hetta málið fyri seg sjálvan við at gjalda tað, henda kvotan kostar við t. d. at lata íslendingum eitt mótvirði í atgongd til at fiska svartkjaft í føroyskum øki.

Tá ið samráðingarnar vóru um at seta TAC (mest loyvda veiðu) á svartkjaft, var semja í føroysku sendinevndini um at Føroyar og EU vóru best fyri í hesum samráðingum tí at svartkjaftsfurin stóran part av árinum ferðaðist í okkara sjógvi og eitt stutt bil í altjóða sjógvi. Vit kundu fiska um eingin avtala var. Vit høvdu atgongd og vit kundu tí eisini halda fast um okkara krøv.

Noreg og Ísland kravdu í síni tíð teirra stóra part av svartkjafta TACnum, men teir høvdu ongastaðni at veiða hann uttan í egnum sjógvi og har er eingin svartkjaftur. Teir hava onga atgongd – stórt sæð.

Í føroysku sendinevndini sóðu vit stórar møguleikar í at lata ella rættari "selja" atgongd til hesi lond tá íð svartkjaftsfurin varð býttur.

Tá í samráðingarnar um svartkjaftin byrjaðu, avráddu Føroyar og Ísland at fiska frítt inni hjá hvørjum øðrum, til kvota varð sett á. Tá var so nógvur svartkjaftur til,at vit eisini fingu svartkjaft í íslendskum sjógvi, men soleiðis er ikki longur. Nú er alt "normalt" aftur. Hetta býtið av svartkjaftinum varð gjørt 16. dec 2005 og Føroyar kundu longu í sáttmálanum við Noreg fyri 2006 brúka atgongd til at fiska svartkjaft sum "gjaldaoyra" at keypa t.d. makrel fyri.

Niðanfyri sæðst ójavnvágin í svartkjaftafiskiskapinum millum Føroyar og Ísland seinastu 3 árini:

| | Føroyar veitt í Íslandi | Ísland veitt í Føroyum |
|---|---|---|
| 2004 | 74.102 | 99.540 |
| 2005 | 28.435 | 162.215 |
| 2006 | 10.000 | 190.000 |

Tølini fyri 2006 eru fyribils. Fara vit 10 ár aftur í tíðina er bert eitt ár, har Ísland hevur veitt minni á føroyskum øki enn vit í íslendskum øki.

Vanligur prísur fyri at keypa atgongd er, at hann sum keypir letur hálvt toskavirði av tí sum hann veiðir. Tað verður goldið við 50 %. T. v. s at um íslendingar sleppa at veiða - sum í fjør t. d. – 190.000 t eiga teir at gjalda toskavirði av 50 % av 190.000 t.e. 85.000 t x ,0,125 = 10.625 toskaequivalentir. Sama ger seg galdandi við loyvinum at fiska norðhavssildina. Íslendingar kunnu fiska alla teirra kvotu á okkara øki.

Men fyrst má fáast skil upp á botnfiskakvotuna. Hon umboðar helst eitt toskavirði uml. 4200 equivalentir svarandi til 35.840 t av svartkjafti og tá íð tað snýr seg um atgongd verður hetta dupult t.v.s. 71.680 t. Nú er so botnfiskakvotan goldin og hon má ikki koma fyri aftur í øðrum samráðingum.

Hinar samráðingarnar kunnu nú byrja við reinum pappíri, har vit "keypa" og "selja" og gjalda við toskaequivalentum. Og vit kunnu nú fáa ein balanseraðan sáttmála – eisini við Ísland.

Sum skattaborgari og medeigari av kvotunum má ein átala tað skilaleysa oyðsli, sum fer fram við at geva tær burtur fyri einki. Hetta eru stórir inntøkumøguleikar, sum samráðingarnevndin legði stóran dent á og sum at enda gav okkum so gott úrslit í svartkjaftasamráðingunum. Atgongdin var besta argumenti.

Ein annar stórur trupulleiki er stóra talið av fremmandum skipum, sum darvar føroysku skipunum í at fiska ta føroysku kvotuna. Her er snøgt sagt ikki pláss fyri øllum. Avmarkingin mótvegis Íslandi til 12 skip er láturlig tí hon hevur onga ávirkan.

Samanum tikið má júst undirskrivaði fiskivinnusáttmálin við Ísland sigast at vera eitt stórt – ella kanska rættari lítið – neyðaregg, sum hevur ómetaliga stórar samfelagsbúskaparligar avleiðingar.

Er Løgtingið ella Løgtingsins uttanlandanevnd kunnað um hesi viðurskifti? Og hvussu gevur mann sína ónøgd til kennar, um mann ikki heldur, at landsins ognir eru nóg væl umsitnar? Eiga vit ikki at fara aftur til, at fiskivinnusáttmálar skulu góðkennast í løgtinginum fyri at verja eigarnar av kvotunum móti tílíkum?

Samráðingaleiðarnir fara lotir fram við vegginum og siga, at hetta var tað, sum lat seg gera – ein 0-loysn. Aftur sum av torvheiðum, tí teir ikki vildu seta krøv, men bara vera fittir. Tað fær eingin nakað fyri í altjóða samráðingum í dag.

Teir størstu trumfirnir geva oftast tey flestu og bestu stikkini. Sjáldan munnu so nógvir stórir trumfir hava givið so fá stikk – fyri ikki at siga einki stikk. Teir vóru ongantíð spældir út.

Sanniliga ein búskaparligur missur av teimum stóru.